*Dagf. 16. mars 2021*
*HMR j. Nr. 21/02720-5*

**Kaj Leo Holm Johannesen**
**landsstýrismaður**

**Svar**

**upp á**

**§52a fyrispurning frá tingkvinnu Ingilín D. Strøm løgtingsmál nr.: 52-094/2020, viðvíkjandi koppsetingarætlanini, ið ikki varð fylgd**

**Fyrispurningur**

1. Í dag, 3. marts 2021, eru 4.190 fólk, ið hava fingið fyrru koppsetingina, meðan 2.523 hava fingið seinnu koppsetingina. Hvussu nógvar av hesum tilsamans 6.713 koppsetingunum eru latnar uttan um almennu koppsetingarætlanina?
2. Hvørji fólk er talan um, sum eru koppsett uttan um koppsetingarætlanina, og hvørjar grundgevingar hava verið fyri at gera hesi frávik frá ætlanini?

**Svar**

Spurningarnir verða svaraðir undir einum.

Í dag hin 16. mars 2021 eru 8.967 koppsetingar gjørdar í Føroyum. Av hesum hevur Sjúkrahúsverkið upplýst, at umleið 20 koppsetingar er gjørdar, sum heimild ikki er fyri í kunngerðini um ókeypis koppseting ímóti COVID-19. Sjúkrahúsverkið harmast um hesi mistøk.

Sum víst hevur verið á alment, hevði Sjúkrahúsverkið nakrar avbjóðingar við koppsetingini í byrjanini. Millum annað kom tað óvart á, at Sjúkrahúsverkið konsekvent fekk so nógvar skamtar úr hvørjum hettuglasi, og somuleiðis vóru eisini onkrir dagar, har tað vóru serliga nógv avboð. Haraftrat hevði Sjúkrahúsverkið ikki fingið til vega fullfíggjað yvirlit yvir tey, ið Sjúkrahúsverkið skuldi koppseta. Hetta kom tó í rættlag í seinnu hálvu av januar.

Hesi viðurskifti høvdu við sær, at tað lupu skamtir av við dagslok. Koppingarevnið frá Pfizer/BioNtech er sera viðbrekið, og má nýtast, tá ið tað er tikið fram, og valdi Sjúkrahúsverkið at kalla fólk inn heldur enn at stoyta koppingarevni burtur. Í einari tíð, har øll heimsins lond mangla koppingarevni, er tað av alstórum týdningi, at so lítið koppingarevni sum gjørligt fer burtur.

Sjúkrahúsverkið hevur skrásett hesar skamtirnar sum avlopsskamtir. Í tíðarskeiðinum 30. desember 2020 til 2. februar vóru umleið 100 fólk, sum fingu burturav avlopsskamtunum. Sjúkrahúsverkið kann staðfesta, at umleið 80 av hesum eru starvsfólk, sum kortini skuldu hava koppsetingina sambært ætlanini. Talan er sostatt um eini 20 fólk, sum ikki áttu at verið koppsett fyri koronu enn sambært koppsetingarætlanini.

Sjúkrahúsverkið kann ikki upplýsa hvørji fólk, talan er um, tí hetta er fevnt av tagnarskyldu, men grundgevingarnar eru sum lýstar omanfyri.

Heilsumálaráðið, 16. mars 2021

**Kaj Leo Holm Johannesen**
landsstýrismaður